## Obama og Medvedev samdir



Forsetarnir í USA og Russlandi, Barrack Obama og Dmitrij Medvedev, eru á einum máli um, at viðurskiftini millum tey bæði stórveldini eru ikki nóg trygg í løtuni, og at tað er neyðugt at bøta um tey. Tað vóru teir samdir um í einari telefonsamrøðu fyrradagin. Russiski uttanríkisráðharrin, Sergej Lavrov, segði seg í gjár rokna við, at Obama og Medvedev fara at halda fund í sambandi við G20-toppfundin, sum verður í London í apríl.

## Løgreglumaður skuldsettur

Í Finnlandi hevur ákæruvaldið skuldsett ein løgreglumenn fyri at hava svikið sína uppgávu sum løgreglumaður. Løgreglumaðurin er skuldsettur fyri grovt vansketni í sambandi við tilburðin, tá ein ungur maður myrdi ein lærara og níggju næmingar í einum skúla í býnumi Kauhajoki tann 23. september í fjør. Løgreglumaðurin hevði tosað við tann unga mannin dagin fyri tilburðin, og hóast hann visti, at drongurin hevði vápn, tók hann ikki vápnið frá honum.

# Vetrarsuita í Focus

**Fríggjadagin letur Jóna Rasmussen upp framsýning í Galerie Focus við grafiskum myndum undir heitinum »Vetrarsuita«**

GRAFIKLIST

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Til nýggju framsýningina hevur Jóna Rasmussen serliga leitað sær íblástur frá barokkini, sum enn einaferð er við til at gera hennara myndir til nakað sertstakt innan føroyska grafiska list.





*Ein óendalig kvirra hvílir yvir myndunum hjá Jónu Rasmussen, sum eins og halda á út í ein óendaligan heim uttanfyri*

### Óendaliga kvirran

Myndirnar hjá Jónu Rasmussen er eyðkendar í mátanum, myndevnið ofta leitar sær út um kantin á verkinum, eins og myndin er brot av eini størri heild, ið liggur uttanfyri onkustaðni.

Í bókini *Livandi list*, vísir Inger Smærup Sørensen, listfrøðingur á, at hendan leitanin hjá verkunum út um seg sjálvan ger, at áskoðarin má gera sær eitt slag av innaru mynd av heildini.

- Kanska hetta er ein leitan eftir tí absolutta - ella onkurum ógreiniligum, upphevjaðum ella háfloygdum, ið ikki ber til at avmynda, okkurt ið dregur seg undan myndaskapinum, eins og vit ofta síggja tað í áhuganum hjá abstraktu ekspressionistunum fyri tí óendaliga, hugleiðir Inger Smærup Sørensen, og leggur afturat

- Í verkunum hjá Jónu Rasmussen er tað kortini tann óendaliga kvirran og tann óendaligi tómleikin, ið tykjast at vera í brennideplinum.

### Íblástur frá barokkini

Jóna Rasmussen arbeiðir bæði við grafiskum myndum og málningum. Íblásturin til myndirnar fær hon millum annað úr náttúruni, frá sjómanslívinum og frá tónleiki. Elementið er ofta vatn í ymsum abstrakt-um skapum. Tann svart/hvíti grafikkurin stendur sterkur, men eisini grafikkur og málningar í litum, ofta í bláum og turkis, standa sterkir við hennara sermerktu strokum.

Jóna Rasmussen hevur síðan 1991 sýnt fram í Føroyum, Danmark og aðrastaðni. Fyrstu serframsýningina hevði hon í Listaskálanum í 1999.

Til hesa framsýningina hevur hon millum annað fingið íblástur frá barokkini og til ferniseringina kemur Kristina á Váli at spæla á cello, sats úr suitu nr. 2 av Bach. Heiti á framsýningini er Vetrarsuita.

Ferniseringverður fríggjadagin frá klokkan 16 til 18. Framsýningin verður opin til 12. februar, týsdag til fríggjadag kl. 15 til 18 og leygardag kl. 16 til 18 í Galerie Focus í Grím Kambansgøtu 20 í Havn.

## Várframsýningin sóknast eftir samleikum

**Evnið á Várframsýniningini 2009 er "Samleiki", sum framsýningin ynskir at lýsa á ein so fjølbroyttan hátt sum gjørligt**

FRAMSÝNING

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

28. februar er seinasta freist at lata inn verk til Várframsýningina. Í ár sóknast framsýningin eftir verkum, sum á ymsan hátt endurspegla skiftandi samleikar í modernaða samfelganum.

### Samleiki í bitlaheiminum

Hugskotið til evnið á Várframsýningini hevur støðið í, at hvønn einasta dag gjøgnum alt lívið lata vit okkum í skiftandi samleikar og leiklutir til ymisk høvi. Í uppvøkstrinum fáa vit ein samleika frá staðnum, vit búgva, og frá menniskjum, vit liva saman við. Alt eftir kyni og uppvøkstri fáa vit ein samleika tillutaðan. Í mannfólkaheiminum finnast eitt nú fótbóltssamleikin, bilførarasamleikin og sjómannasamleikin. Í konufólkaheiminum finnast aftur aðrir samleikar, eitt nú móðurleikluturin, flakakvinnan og húsmóðirin. Eisini sjálvsfatan okkara er eitt slag av samleika.

Samleikar hoyra til øll lívsins viðurskifti. At enda fara vit øll í eftirløn og flyta okkum inn í eldraleiklutin, inn í seinasta tíðarskeiðið á lívsins leið. Oman fyri allar hesareinstaklingasamleikarnar liggja størri bólkar sum samleiki grundað á politiska samføring, átrúnaðarligt tilknýti og tjóðskap.

Áhugin fyri tí at vera knýttur at onkrum og at skifta samleika er vaksin í modernaða heiminum, har ferðslan yvir um landamørk økist í stórum sum úrslit av orsakað av altjóðagerðini. Tað er vorðið vanligari at skapa egnu sjálvsmynd sína og at átaka sær ein samleika fyri at staðfesta seg sjálvan undir broytandi umstøðum. Hetta samleikaspælið ávirkar eisini bitlaheim okkara í Føroyum, um vit vilja tað ella ei.

### Sensurerað framsýning

Várframsýningin er sensurerað. Ein trímannað dómsnevnd úr Føroysk Myndlistafólk velur út og setir framsýningina saman við innkomnum verkum og øðrum viðkomandi tilfari.

Dómsnevndin er áhugað í øllum listarligum myndframburðum fyri at skapa eina so fjølbroytta og útgreinandi framsýning sum gjørligt.



*Okkara mongu og ymsu samleikar gjøgnum lívið er evnið á Várframsýningini í ár*

### FAKTA

**Várframsýningin 2009 verður í Listasavni Føroya 13. mars - 12. apríl.**

**Freist fyri innlating av uppskoti:** 28. februar 2009.
**Innlatingarkostnaður:** Fyri hvønn einstakling er innlatingarkostnaðurin kr. 300,-

Listafólkini fáa svar skjótast møguligt, soleiðis at listaverkini kunnu latast inn í Listaskálan.